## Úr Løgtinginum



### Uppskot um varðhaldsfongsul tikið aftur

JOHN JOHANNESSEN

Katrin Dahl Jacobsen hevur tikið uppskotið um at seta í gildi í Føroyum eitt ríkislógartilmæli, ið gevur heimild til at varðhaldsfongsla fólk, ið eru ákærd fyri at hava framt harðskap.

Hesum boðaði tingformaðurin frá á tingfundinum seinasta fríggjadag.

Uppskotið hjá Katrini Dahl Jacobsen var lagt fram 20. januar og var til fyrstu viðgerðar tann 25. januar, har tað varð beint í rættarnevndina.

Men ein mánaða eftir fyrstu viðgerðina, tann 25. februar, boðaði Katrin Dahl Jacobsen í skrivi tingformanninum frá, at hon tók uppskotið aftur, og kom tað sostætt aldi til aðru viðgerðar.

Uppskotið hjá Katrini Dahl Jacobsen innibar at seta í gildi eitt ríkislógartilmæli, ið hon metti fór at minka um talið av harðskapsmálum í Føroyum. Tingkvinnan vísti í viðmerkingunum til uppskotið á, at í juni 1987 varð rættargangslógin fyri Danmark broytt soleiðis, at varðhaldsfongsling verður framd í harðskapsførum undir nærri ásettum treytum.

Men hendan lógarbroytingin er ikki sett í gildi fyri Føroyar. Men varð hon sett í gildi, hevði vaksandi harðskapurin í Føroyum minkað, metti Katrin Dahl Jacobsen, ið nú kortini hevur tikið uppskotið aftur.



### Ásetingarlógin fyri tingið

JOHN JOHANNESSEN

Nógv umtalaða uppskotið um broytingar í ásetingarlógini, ið skal tryggja pensjónistunum, at skattaviðurskifti teirra eru í lagi, var til fyrstu viðgerðar á tingfundinum í gjár.

Talan er um eitt broytingaruppskot, ið Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri legði fyri tingið 25. februar í ár. Hetta broytingaruppskotið til ásetingarlógina varð sostætt lagt fyri tingið ellivu dagar eftir, at ásetingarlógin varð samtykt. Henda varð nevniliga samtykt 14. februar í ár.

Landsstýrið vísir á, at fólkapensjónistarnir við hesi broyting fáa ta hækking í tøkum peningi, sum ætlanin var, at teir skuldu fáa við lógini um javning av almannapensjónum. Ein stakur fólkapensjónistur fær umleið 12.000 krónur meira at ráða yvir og ein giftur umleið 8.000 krónur.

### Fyrispurningur um bensinavgjøld

JOHN JOHANNESSEN

Á tingfundinum í gjár skuldi Karsten Hansem, landsstýrismaður í fíggjarmálum, svara fólkaflokstingmanninum, Bjarna Djurholm, uppá tríggjar spurningar viðvíkjandi bensin- og dieselavgjøldum.

Tingmaðurin vildi hava at vita, faktaprísirnar á bensini og á diesel, hvørji avgjøldini á hesum eru, og hvussu tey verða ásett. Eisini vildi tingmaðurin hava at vita, um landsstýrismaðurin hevur ætlanir um at lækka ella regulera avgjøldini á bensini, so bensinprísurin verður javnari í lutfalli við dieselprísin.

Spurningin setti Bjarni Djurholm í sambandi við, at tað í løtuni verða fluttir alt fleiri og fleiri dýrir dieselbilar til landið, orsakað av, at diesel er so nógv bíliari brennievni enn bensin í Føroyum.

# Pensjónistar meira pengar at ráða yvir

*Ein stakur fólkapensjónistur fær umleið 12.000 kr. meira at ráða yvir og ein giftur umleið 8.000 kr. sambært nýggja uppskotinum hjá fíggjarmálaráðharranum*

ÓLAVUR Í BEITI

Í farnu viku legði fíggjarmálaráðharrin Karsten Hansen fram lógaruppskot til broyting í løgtingslóg um áseting av skatti, sum eru ein fylgja av broytingunum í lógini um almannapensjónir og lógini um áseting og javning av almannaveitingum, sum Løgtingið samtykti í 1999.

Ætlan landsstýrisins var, at hækkingin í pensjónunum eisini skuldi geva eina hækking í tøkum peningi hjá pensjónistunum, sigur fíggjarmálaráðharrin í viðmerkingunum, og at ætlan landsstýrisins er ikki at fáa størri skattainntøkur við tí nýggju pensjónslógini, og tí er tað neyðugt at gera ávísar broytingar í skattalóggávuni.

#### Frádrátturin hækkar munandi

Fíggjarmálaráðharrin greiður frá, at við at hækka frádráttin í útroknaða skattinum soleiðis, at hann svarar til ta upphædd, sum ein fólkapensjónistur, sum ikki hevur aðra inntøku enn fólkapensjónina, skal rinda í skatti av tí upphædd, sum fólkapensjónin er hækkað í einari kommunu við hægsta skattaprosenti (23) og kirkjuskattaprosenti upp á 1%, fáa flestu pensjónistar og tey, sum fáa lægstu fyritíðarpensjón ein frádrátt í útroknaða skattinum, sum svarar umleið til skattin av grundupphæddini av fólkapensjónini og hækkingini av viðbótini. Fyri giftar pensjónistar hækkar frádrátturin í skattinum frá 7.800 kr. til 10.500 kr, og fyri stakar pensjónistar hækkar frádrátturin í skattinum frá 11.100 kr. til 16.200 kr.

– Fólkapensjónistarnir fáa við hesi broyting ta hækking í tøkum peningi, sum ætlanin var, at teir skuldu fáa við lógini um javning av almannapensjónum. Ein stakur fólkapensjónistur fær umleið 12.000 kr. meira at ráða yvir og ein giftur umleið 8.000 kr. Fyri persónar við lægstu fyritíðarpensjón er eisini talan um munandi vøkstur í tøkum peningi, sum eisini hevur verið ætlan landsstýrisins.

#### Ov nógvi skatturin

Hvat tí ov nógv goldna skattinum í januar og februar viðvíkur, sigur fíggjarmálaráðharrin, so er skattaskipanin soleiðis, at ov nógv goldni skatturin í desember 1999 (pensjónin fyri januar 2000) ikki kann verða javnaður við lægri skatti í eftir verandi parti av 2000. Heldur ikki við avlopsskatti, tá skattauppgerðin fyri 1999 verður gjørd.



*– Fólkapensjónistarnir fáa við hesi brøyting ta hækking í tøkum peningi, sum ætlanin var, at teir skuldu fáa við lógini um javning av almannapensjónum, sigur Karsten Hansen um nýggja uppskotið*

– Tann ov nógv goldni skatturin fyri februar verður javnaður soleiðis, at teir pensjónistar, sum gjalda skatt av pensjón ella aðrari inntøku restina av árinum, fáa minni skatt enn teir annars høvdu fingið av hesum inntøkum, og teir pensjónistar, sum ikki gjalda skatt av pensjón ella aðrari inntøku, fáa avlopsskatt, tá ársuppgerðin verður gjørd, sigur Karsten Hansen m.a. í viðmerkingunum.

# Tvey øki føroyskan áhuga

*Á fundi millum fiskivinnuráðharrarnar í ES í november 1999 varð samtykt nýggj reglugerð fyri skipanina av marknaðinum fyri fiska- og alifiskavørur*

Í tíðindaskrivi frá Vinnuhúsinum verður nevnt um nýggju reglugerðina sum kemur í gildið 1. januar 2001 og kemur í staðin fyri reglugerð 3759/92.

Endamálið við reglugerðini, sum verður kallað COM (Common Organisation of the Markets in Fishery and Aquaculture Products), er at skapa varandi javnvág millum tilfeingið og fiskiorkuna, og at geva vinnuni á landi ivaleyst av rávøru at arbeiða við, samstundis sum arbeiðspláss á havinum ikki verða hótt.

#### Ávirkar útflytarar

Tá lóggávan er gjørd, sum fylgir reglugerðini frá ráðharrafundinum upp, ber til at siga nágreiniliga, hvussu hetta fer at ávirka føroyskar útflytarar.

Tað eru serliga tvey øki í reglugerðini, sum hava føroyskan áhugað. Tey eru: betur kunning til brúkaran og javnvágin millum útboðið og eftirspurningin av rávørum, skrivar Vinnuhúsið.



*Fiskivinnuráðharrararnir í ES royna at skapa umstøður fyri, at vinnan á landi hevur ivaleyst av rávøru at arbeiða við,samstundis sum arbeiðspláss á havinum ikki verða hótt*





*Skúlin í Sandvík lýkur ikki tey krøv, sum verða stt til skúlar nú á døgum, tí skal hann byggjast út í summar*

# Skúlin í Sandvík byggjast út

*Skúlin fær tvær stovur afturat, eina til teldu og eina til handverk og list*

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú skal skúlin í Sandvík byggjast út.

Hvalbiar Bygdaráð, sum Sandvík er undir, hevur amtykt at fara undir arbeiðið fyrsta dagin, so skjótt sum veðrið batnar, so at skúlin verður liðugur, tá ið hann byrjar aftur aftaná summarfrítíðina.

Levi Niclasen, bygdaráðsformaður, sigur, at tað, sum verður gjørt, er at byggja átta metrar upp eystara enda á skúlanum.

Har verða so tvær nýggjar skúlastovur.

Onnur skal verða teldustova og hin skal verða til handverk og list og evning.

Levi Niclasen sigur, at annars varð tosað um at lyfta hann upp ístaðin, men bygdaráðið kom til ta niðurstøðu, at rættast var at byggja frameftir jørð.

Hann sigur, at útbyggingin er neyðug, tí sum er lýkur skúlin ikki tey krøv, sum verða sett til hølisviðurskiftini.

Í skúlanum sum er, er bara tann eina skúlastovan, og har skal so alt fara fram, bæði vanlig undirvísing, telduarbeiði, evning, handverk og list og annað, sum annars krevur serlig høli.

Bygdaráðsformaðurin sigur, at skúlin í Sandvík hevur nú eisini fingið teldur, men sum er, eru tær settar upp í skúlastovuni sum er, og tað er ikki tann besta loysnin.

Tað fer at verður mett, at tað fer at kosta kommununi einar 300-350.000 krónur at byggja skúlan út.

# Franskar vørur av føroysku hillunum

*Áðrenn middag í gjár skuldu allar vørur frá fronsku heilsøluni, Sapar, við ávísum góðkennismerki vera tiknar av føroysku handilshillunum. Orsøkin er, at vandi er fyri listeria*

JOHN JOHANNESSEN

Allar føroyskar heilsølur, størri handlar, hotel og køkar á stovnum fingu í gjár boð frá Heilsufrøðiligu Starvstovuni um, at allar vørur, sum eru frá SAPAR í Fraklandi og hava góðkenningarnummarið 77-284-03, skuldu takast av hillunum innan á middegi í gjár.

Orsøkin til boðini er, at vandamikla listeriabakterian í undanfarnu viku varð funnin í vørum av hesum slag í Fraklandi, har 23 fólk gjørdust sjúk, og sjey teirra so álvarsliga sjúk, at tey doyðu.

#### Veik í størstum vanda

Danska matvørudirektoratið vísir í tíðindaskrivi á, at tað oftast bert eru fólk við veikari immunverju, ið fáa sjúkuna lieriosu av vandamiklu listeriabakteriunum.

Mett verður, at tey, sum eru í størstum vanda, eru drykkjufólk, fólk við sukursjúku og fólk við AIDS ella krabbameini. Eisini eru gomul, nýføðingar og kvinnur, ið bera barn undir belti, í vandabólkinum.

Men sjúkan kann eisini raka fólk, ið eru uttan fyri vandabólkin.

Tíðin frá tú verður smittaður til sjúkan brýtur út til tú verður smittaður, liggur millum fáar dagar og heilar tveir mánaðir. Sjúkan kann elva til blóðeitran og menegitis, og kann hin eisini elva til, at barnakonur kasta missa barnið. Vandin fyri at doyggja av listeriosu er yvir 50 prosent hjá fólkum í vandabólkinum, men nógv lægri hjá fólkum uttanfyri.

Sjúkueyðkennini eru oftast, at tú hevur ringt við at síggja, munnurin gerst turrur, ringt er at svøgja og tú fert at spýggja. Eisini verður tú leysur í vøddunum, men tó hevur tú ongan fepur.

Hava fólk hesi eyðkenni fáar dagar eftir, at tey hava etið mat frá SAPAR, eiga tey at fara til lækna sum skjótast, sigur danska matvørudirektoratið í tíðindaskrivi, Heilsufrøðiliga Starvstovan hevur sent út.

#### Fleiri nøvn

Franska fyritøkan, SAPAR, selur vørur sínar undir fleiri ymiskum nøvnum. Nøkur teirra eru Jac Gourmet, Trateur, Antoine AUGE, DELICE DE SUZON, VAL HEREUX og SAPAR. Hesar vørur eru allar í vanda fyri at hava ov nógvar listeria bakteriur í sær.

Okkum nýtist kortini ikki at minnast øll hesi torføru nøvnini, tí felags fyri allar vørurnar er, at tær hava góðkenningarmerkið 77-284-03.

# Uni Næs nýggjur prestur í Fuglafirði

JOHN JOHANNESSEN

Presturin í Fuglafjarðar prestagjaldi eitur frá degnum í dag Uni Næs. Hann tekur við starvinum eftir Peter O. K. Olofson, sum segði seg úr starvi, eftir, at hann ikki fekk viðhald í kærunum, hann fyri knøppum ári síðani sendi danska kirkjumálaráðnum um Føroya Bisp, Hans Jacob Joensen.

Uni Næs hevur seinastu mongu árini verið prestur í Vestmanna. Men nú høvi beyst at royna nakað annað, helt hann tað vera vert at søkja starvi í Fuglafirði.

Fuglafjarðar prestagjald og Nes prestagjald verða í næstum deild í trý. Hetta fer at lætta um arbeiðsbyrðuna hjá einstaku prestunum í Eysturoynni.

Fyrrverandi presturin í Fuglafirði, Peter O. K. Olofson, flytur nú til Klaksvíkar at búgva.

*Uni Næs flytur nú úr Vestmanna til Fuglafjarðar at virka sum prestur*




# Umrøða nýskapan og vitan

Serkøn fólk fara at meta um, hvar Norðurland standa við byrjanina til 21. øld, tá Norðurlandaráðið skipar fyri evnisráðstevnu í Keypmannhavn.

Ráðstevnan verður hildin í fólkatinginum mánadagin og týsdagin, og millum tey, sum fara at røða um hesi viðurskifti eru Helga Nowotny, professari, Bertel Haarder, næstformaður í Europaparlamentinum, Jón Sigurðsson, stjóri í norðurlendska íløgubankanum, og Erkki Ormala, stjóri í Nokia.

Nýskapan og vitan eru avgerandi fyri vælferð og inntøku hjá einum landi og øki. Hvussu standa Norðurland í hesum høpi, og hvussu verður gjørt fyri at styrkja og menna Norðurlond sum eitt vitanar- og menningarøki.

Undir ráðstevnuni verða norðurlendsku virðislønirnar fyri tónleik og bókmentir handaðar ávíkavist Kaija Saariaho úr Finlandi og Henrik Nordbrendt úr Danmark.

Føroyskir tingmenn verða eisini umboðaðir á ráðstevnuni. Frá Norðurlandanevndini luttaka Jógvan við Keldu og Dan Reinert Petersen, og fyri Útnorðurráðið luttekur formaðurin Jógvan Durhuus.

**ek**

# Allir kassarnir lætnir upp í vár

Veðrið fáa vit onki gjørt við. Men annars skuldi fortreytirnar hjá útróðrinum at gera tað gott í várróðrinum í ár, verið nógv betri í ár, enn tær vóru í fjør.

Í øllum førum hevur fiskimálaráðharrin nú gjørt av at lata allar kassarnar norðanfyri og vestanfyri upp fyri snelluni í vár Teir vórðu eisini lætnir upp í fjør, men tað var so seint, at tað kom lítil og ongin nytta burturúr tí. Men í ár verða kassarnir lætnir upp í góðari tíð og tað skuldi verið ein góður bati hjá útróðrinum, ikki mint, tá ið hugsað verður um, at várróðurin er besta tíðin hjá útróðrarbátunum yvirhøvur

Útróðrarmenn siga, at várróðurin er stuttur Og verða so leiðirnar avmarkaðar aftrurat, eru umstøðurnar at fáa nakað munagott burturúr, ikki so góðar.

*–Áki–*

Almanna- og Heilsumálastýrið

**Móttøka**

**Sjúklingahotellið Tórshavn**

Hotel Tórshavn er flutt í nýggj hølir og hevur skift navn til

**Sjúklingahotellið Tórshavn.**

Í hesum sambandið verður móttøka

**fríggjadagin tann 3. mars 2000**
**kl. 14.00-17.00**

í hølunum í Taasingegade 29,
4. hædd, 2100 København Ø.